## DAGSINS MEINING

# Lukkað í kirkjutíð

Sama Løgting, ið vil útseta nakað so umráðandi sum fiskapakkan, hevur ongar trupulleikar við at samtykkja onnur ting, ið als ikki hava sama skundin sum fiskapakkin. Tingið samtykti við aðru viðgerð eina nýggja upplatingarlóg, ið skuldi vera ein liberalisering. Tað er hon helst eisini á flestu punktum, men eitt markant undantak er.

Tað verður, sum vit longu hava umrøtt á hesum stað í farnu viku, álagt øllum handlum íroknað bakaríum og bensinsølum at stongja millum tíggju og tvey sunnu- og halgidagar. Við øðrum orðum vil Løgtingið samtykkja í 2005, at eingin skal sleppa at keypa í kirkjutíð.

Sjálvandi skal man hava virðing fyri teimum, ið ganga høgt uppí sítt trúarlív og lata vera við at skipa fyri tiltøkum undir kirkjuveggi í kirkjutíð, men máti skal verða við øllum. Nær ein gongur á møti ella í kirkju, ella um ein yvirhøvur gongur á møti ella í kirkju er eins egna søk, og tí ger Løgtingið nakað nógv av, tá tað samtykkir at bert tey, ið eru uppi áðrenn klokkan tíggju sunnumorgun kunnu keypa sær rundstykkir og annað. Um fólk hava eitt brennandi ynski um at binda frið millum tíggju og tólv sunnudag, so finna tey óivað sjálvi útav tí, uttan Løgtingsins innblandan.

Tað er, sum vit innleiddu, eitt relativt lítið luksusmál, um handlar skulu sleppa at selja nakað í kirkjutíð, og nógv meira týðandi liggur á láni sum til dømis áðurnevndi fiskapakki. Tó eiga Løgtingslimir at siga borgarum hví, teir vilja lukka handlar sunnudag. Er tað tí at tað er kirkjutíð, ella er tað umsorgan fyri starvsfólkið?

Vit sita eftir við varhuganum, at tað er tað fyrra, hóast tinglimir ikki vilja viðganga hetta. Um tað var umsorgan fyri starvsfólkunum, so kundi tingið bert ásett eitt tímatal, sum handlar kundu havt opið sunnu- og halgidagar, og so kundu hesir handlar sjálvir avgjørt, nær opið skuldi verið. Hetta hevði verið nógv skilabetri. Um allir handlar í Havn ella Klaksvík vóru lukkaðir millum tíggju og tólv uttan ein í hvørjum staði, so hevði hesin eini handil ella bakarí uttan iva havt úr at gera. Hetta bendir á ein tørv. Er uppgávan hjá tinginum ikki júst at tryggja, at borgarans tørvur verður nøktaður?

Um so var, at fakfeløg og onnur høvdu eitt sterkt ynski um, at limir teirra ikki skuldu arbeitt millum tíggju og tólv sunnudag, so var øðrvísi, men hetta nýggja uppskot kemur frá tinginum sjálvum, uttan serstaka grundgeving annað enn "hvat ger tað, at fólk binda frið nakrar tímar sunnudag?". Svarið til henda spurning er helst millum lítið og einki, men um grundin hjá Løgtinginum er átrúnaðarlig lóggáva, so eiga vit at spyrja, hvat tað næsta verður. Bann móti dansi í føstu? Einki kortspæl á almennum støðum í føstu? Lóg móti barnaspæli og bilkoyring í kirkjutíð? Vit spyrja bara. Vit fáa at síggja hvussu leikur fer í hesum máli. Og tað gjørdu vit seinnapartin mikudagin, tá hetta blað fór til prentingar. Tá skuldi tingið nevniliga við 3. viðgerð taka støðu til málið aftur og har fleiri tingmenn komu við broytingaruppskoti um at stegða lógini, sum varð samtykt við 2. viðgerð.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Útlendingamálið – skandala !!!

**Hans Joensen**
*Garðsgøta 19, Argir*

Harra innlendismálaráðharri Jógvan við Keldu.

Enn einaferð er so útlendingamálið uppi og vendur og ikki kann sigast, at hesu ferð er handfaringin væl úr hondum greidd. Havi nærmast hug at siga landaskomm um hetta mál, og skammist ikki sørt sum vanligur borgari í Føroyum at uppliva, at harra Jógvan við Keldu, landsstýrismaður, við sínum alski til móðurmálið, ikki vil skriva á donskum til danskan stovn, men tvíheldur um móðurmálið.

Lat tað verða sagt hart og týðuliga, at útlendingamálið ikki snýr seg um móðurmálið.

Tað snýr seg um livandi persónar, sum búgva her á landi og sum skulu søkja um loyvi at verða her í Føroyum eina ferð um árið.

Tað allar minstra krav hesir persónar eiga, er í roynd og veru at fáa svar frá landsins myndugleikum. So vinarliga, Jógvan við Keldu, set fólkið hjá tær í innlendismálaráðnum í gongd beinanvegin, og avgreið hesi mál (á donskum).

Sum skilst, so er Jógvan firtin, tí politiið følir seg sum gísla í hesum máli, men so er ikki. Gíslin er tíverri útlendingurin, og tað hevur hann verið alla tíðina.

# Lóggeva okkum 100 ár aftur í tíðina

**Finnleif Guttesen**



Nú vit skriva 2005…

Hvat er hatta fyri ein dupultmoralur og innantóm heilagralótir, sum løgtingsfólk vísa Føroya fólkið við afturlatingarlógini

Nú ætlar løgtingið at lóggeva nær fólk skulu fara á møti ella í kirkju. SvF vísti fleiri løgtingsfólk, ið við himmalvendum eygum og gloriu um høvdi, tóku undir við afturlatingarlógini, tí tað skuldi verða so gott fyri okkum øll.

Størri møsn enn tað vit hoyrdu í SvF frá løgtingslimum skulu vit leita leingi eftir og enn tá var tað ein ungur prestur, sum segði, at so kundu børnini binda frið í tíðarskeiðinum millum kl. 10 og 14.

Eitt skilagott uppskot var, og tað kom adventistaprestinum við, har hann segði, at løgtingi skuldi slett ikki blanda seg uppí upplatingartíðirnar.

Latið handilseigarar, starvsfólk og fakfeløg teirra avgera, nær og um tey vilja hava opið, og latum okkum fáa frið fyri tykkara dupultmorali og innantómu heilagralótum.

# Stressless ella lógarfest siesta

**Kári Leivsson**
*sálarfrøðingur*



Um tað er eitt avstressað samfelag, sum politikararnir ynskja við lógaruppskotinum um, at allur handil skal bannast sunnudag millum kl 10 og 14, so áttu teir heldur at lagt alt samfelagið lamið hvønn dag hesar tíðir – ella tað, sum sunnan fyri verður kalla siesta.

Vísundarlig gransking vísir, at avstressing ikki kann avmarkast til ein dag um vikuna, hon má vera støðug.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.